## Ovfarnir sveisarar

Fótbóltskrýddir sveisarar hava um vikuskiftið fylt nógv í býarmyndini í Havn. Leygarmorgunin hitti Sosialurin nakrar teirra,

Teir vóru ovfarnir av tí nógva lívinum, sum var í býnum í fríggjakvøldið. Teir fegnaðust serliga um útikonsertina í Gamla kommunuskúlagarðinum og um Café Nattúr, sum teir søgdu vera eitt fantastiskt stað

-nud

## Nýggj urga í kapellinum

Kapellið í kirkjugarðinum við Velbastaðvegin í Havn hevur fingið nýggja urgu. Talan er um eina Content D 4330 úr ljósari eik. Simme Musikkhús hevur selt urguna

Urgan ljóðar framúr væl, og eingin ivið er um, at tørvur hevur verið á henni.

Sambært Tórshavnar kommunu hevur gamla urgan tænt fyri seg, og nógvir trupulleikar vóru við henni. Ætlanin um at skifta urguna er gomul, og endiliga er urgan komin. Hetta er fyrsta stig í teimum nýtímansgerðum og umvælingum, sum Tórshavnar kommuna ger í Kapellinum í næstum.

nud

## Martin Joensen við orkestri á MjúS

Kanska størsti føroyski sangskrivarin, Martin Joensen, verður at hoyra á MjúS festivalinum á Sandi. Martin Joensen eigur sín stóra part av Grønu Sangbók, og hann taldist millum bestu konsertupplivingarnar á G! í fjør.

Martin Joensen arbeiðir við eini nýggjari útgávu, og á Sandi verður høvið at hoyra løg av nýggju fløguni, umframt øll tey ógloymandi løgini sum: Morgun, Svarti Ravnur, Tað kundi verið so gott og Í tínum eygum.

nud

## Innbrot á Heimavirkið

Hóast Norðoyarstevnu og nógv fólk í býnum, hevur løgreglan ikki havt nógv at gjørt í Klaksvík. Fríggjakvøldið og leygarnáttina var púrt einki at gera, nøkur full fólk vórðu tikin upp og koyrd heim. Leygarkvøldið var eitt Innbrot hjá Heimavirkinum, enn er ikki greitt, um nakað er stolið.

Harafturat varð ein taska við 1.800 kr. stolin frá teimum, sum høvdu barnamotorsúkklukoyring við skúlan á Ziskatrøð. Løgreglan stendur á berum í báðum málum.

Eisini sunnunáttina vórðu nakrir fullir menn koyrdir til hús.

nud

## Fekk glas í høvdið

Ein ungur maður skar seg í andlitið leygarnáttina, tá hann fekk eitt glas í høvdið á einum skeinkistað. Maðurin hevur ikki ynskt at melda málið, tí hendingin fór fram í rokið, og maðurin segði við løgregluna, at hann sjálvur var orsøk til hendingina.

Tað skilst, at maðurin varð blakaður út av einum skeinkistað fleiri ferðir, og bleiv við at koma inn aftur. Seinastu ferðina varð eitt sindur roki, og endin varð, at maðurin fekk eitt glas í andlitið og skar seg. Hann varð koyrdur á skaðastovuna. Løgreglan hevur kannað málið, og sigur, at sum nú er, verður ikki meiri gjørt við tað.

-nud



*Tónleikabólkurin Makrel skal hesa vikuna royna seg móti átta bólkum um eitt pláss í finaluni í Nordic Band Unsigned kappingini á tónleikarásini MTV.*

# Makrel í mánaðarfinalu hesa vikuna

**Í farnu viku vunnu Makrel seg í mánaðarfinaluna í Nordic Band Unsigned kappingini, sum MTV og Samsung skipa fyri. Mánaðarfinalan er hesa vikuna**

TÓNLEIKUR

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Hesa vikuna royna Makrel seg ímóti teimum átta bólkunum, sum seinastu tríggjar vikurnar hava vunnið sær veg í mánaðarfinaluna: ATN, ATONIC, Coin, Frank Iversen, Madrigal, Molotov, Sister Sin, True Confession. Hvørjir av hesum bólkum skulu í finaluna, har møguleiki er at vinna ein útgávusáttmála, eru tað tey, sum vitja síðuna, sum avgera. Til ber at fara inn á www.nordicunsigned.com og atkvøða eina ferð um døgnið.

### Fegnast um stuðulin

Ári Rouch, sangari í Makrel, sigur við Sosialin, at hann er ótrúliga glaður fyri stuðulin, teir hava fingið frá føroyingum. Makrel fekk næstan helvtina av atkvøðunum, og tað er flott. Hann ivast ikki í, at tær flestu av hesum atkvøðum vóru føroyskar.

Teir meldaðu seg til kappingina, tí tað var so øgiliga lætt. Tað kundi gerast við at uppload eitt lag á eina heimasíðu. Teir høvdu eina góða upptøku av lagnum „Forever and Beyond" frá hálvfinaluni í Suðuroy, og føroyingar høvdu tikið tað til sín, so hví ikki royna.

Rasmus Rasmussen gittarleikari í bólkinum sigur, at teir eru ovfarnir av, hvussu góð viðmæli, ið teir hava fingið aftan á Prix Føroyar. Tá teir meldaðu seg til, vóru teir í iva, um løgini vóru nóg góð. Men móttøkan varð betri, enn teir høvdu tora at droymt um.

Teir høvdu enntá hugsa um ikki at hava sangin "Forever and Beyond" við á Prixnum. Sambært Ára Rouch var ein úr bólkinum beinleiðis ímóti, at teir spældu hann. So teir høvdu als ikki væntað, at hann skuldi gerast nummar eitt fyrst á 15 teimum bestu, og síðan í innleiðandi kappingini í Nordic Bands Unsigned.

Bólkurin hevur enn dreymin um at gera um seg uttanlanda. Men enn hava teir hvørkið management ella bookingfelag. Í summar spæla teir á tveimum festivalum og fara síðan til Noregs og Danmarkar at spæla. Í august ætla teir sær aftur í upptøkuhølið.

---

# Høvdu vónað at fingið meira burturúr

**Tiltakið hjá skótunum á Landssjúkrahúsinum leygardagin gav ikki væntaða yvirskotið**

UPPBOÐSSØLA

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Leygardagin skipaðu Skótalið Sigmunds Brestursonar og Landssjúkrahúsið fyri loppumarknaði og uppboðssølu av gomlum innbúgvi og øðrum búnýti í veitsluhøllini á Landssjúkrahúsinum. Samlaða sølan varð 72.000 kr.

### Eingin bjóðaði upp á bilin

Mikkjal Helmsdal fyri skótarnar sigur, at hann væntar, at tá útreiðslur og annað eru trektar av, verða umleið 35-40.000 kr. til skótarnar. Hetta er sjálvandi gott, men hann viðgekk eisini, at vónirnar høvdu verið størri enn hetta. Millum annað var ein bilur á uppboðssøluni, lægsta boð skuldi verða 50.000, fyri at Landssjúkrahúsið vildi selja. Men eingin kom við so høgum boði. So nú verður bilurin settur til sølu hjá einum bilsølumanni.

Mikkjal Helmsdal segði, at tað gekk stak væl at sleppa sær av við tallerkar og koppar og teir bíligastu møblarnar. Men tey dýraru tingini vóru truplari at selja Tað, sum ikki varð selt, endar nú á Endurnýtsluni á Sandvíkahjalla.

Hetta tiltak var ein patur av uppruddingararbeiðinum hjá Landssjúkrahúsinum. Sambært Mikkjal Helmsdal, hava skótarnir lagt nógv arbeiðið í hetta tiltak, og samanlagt hava teir brúkt einar 500 arbeiðstímar.